Álit

í

løgtingsmáli nr. 78/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin) (Persónar, sum hava fingið tillutaða framskundaða pensjón ella fyritíðarpensjón, kunnu byrja útgjald av eftirlønarsamansparing áðrenn almenna fólkapensjónsaldurin)

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 29. januar 2026, og eftir 1. viðgerð 5. februar 2026 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 9. og 12. februar 2026.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Verkafólk, Betri Pensjón, landsstýriskvinnuna í almanna- og heilsumálum, Margit Stórá, saman við Almannaverkinum og landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið snýr seg um at broyta eftirlønarlógina soleiðis, at eftirlønarsamansparari, sum hevur fingið tillutaða framskundaða pensjón ella fyritíðarpensjón, kann byrja útgjald av sínari eginuppsparing samstundis.

Undir viðgerðini er komið fram, at feløgini í samtakinum Verkafólk taka undir við uppskotinum og meta tað vera jaligt fyri teirra limir. Uppskotið gevur eisini góða meining í mun til, at livialdurin hjá fólki er tongdur at teirra arbeiðsstøðu. Verkafólk meta, at teir flestu av teirra limum í dag og nøkur ár fram hava eina eginuppsparing, ið er minni enn 400 tús. kr., sum merkir, at ein kann fáa upp til 60 tús. kr. út sum kapitalútgjald og restina útgoldna við upp til 2.500 kr. um mánaðin. Verkafólk hava eftirlýst, at ein broyting verður gjørd í lógini um AMEG, so at útgjaldið haðani eisini kann byrja fyrr.

Betri Pensjón tekur eisini undir við broytingini, og hava tey saman við øðrum viðkomandi pørtum verið á undanfundi í Fíggjarmálaráðnum í desember 2025 um málið. Betri Pensjón hevur upplýst, at í praksis fer hetta uppskotið at merkja, at eftirlønarútgjaldið hjá hesum bólki verður forskotið, so at tað byrjar trý ár fyrr, og hevur hetta sum so ikki umsitingarligar avleiðingar við sær.

Landsstýriskvinnan í almanna- og heilsumálum hevur upplýst fyri nevndini, at við ársenda 2025 eru 20 fólk, ið eru á framskundaðari pensjón, og umleið 60 fólk, ið hava fingið tillutaða fyritíðarpensjón, aftaná tey eru fylt 64½ ár.

Samlaða talið av fólki eldri enn 64½ ár, sum annaðhvørt fáa fyritíðarpensjón, íroknað tey, sum hava fingið tillutaða fyritíðarpensjón á yngri árum, ella framskundaða pensjón, er 293, og hesi kunnu potentielt taka av møguleikanum at fáa framskundað útgjaldið av sínari eginuppsparing.

Til spurningin um at fáa tøl fyri livialdur hjá fyritíðarpensjonistum, ið eru vorðnir fólkapensjonistar, varð upplýst, at Almannaverkið kann ikki fara longur aftur enn 2014. Skal hetta kannast longri aftur, má tað gerast manuelt við at fara inn í einstøku málini.

Til spurningin um tað er ov trupult og gongur ov long tíð í samband við at søkja framskundaða pensjón, so fer Almannaverkið at gera skipanina meira sjónliga á heimasíðuni og stjórnarráðið at senda kunning út til komunulæknarnar.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 19. februar 2026

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Dennis Holm	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	